FT

## Umsóknarblað

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

FT_fo_300824

# Umsókn um góðkenning av føroyskum arbeiðsgevara til at seta triðjalandsborgarar í starv (Fast Track)

**Hvat kann umsóknarblaðið brúkast til?**
Arbeiðsgevarar í Føroyum kunnu nýta umsóknarblaðið til at søkja um góðkenning eftir Fast Track-skipanini. Skipanin hevur við sær m.a. skjótari málsviðgerð og møguleika hjá arbeiðsgevarum í øllum vinnugreinum at fáa arbeiðsmegi úr triðjalondum (t.e. lond uttan fyri ES og Norðanlond).

Uppihaldsloyvi kunnu gevast eftir hesi serskipan, tá arbeiðsloysið er undir 3,5 prosent. Um arbeiðsloysið í eina tíð fer upp um 3,5 prosent, fer skipanin úr gildi. Landsstýrið kann eisini avgera at seta skipanina úr gildi í síni heild ella fyri ávísar vinnur.

Góðkenning til Fast Track gevur arbeiðsgevaranum rætt til at seta í starv arbeiðstakarar eftir hesi serskipan.

Góðkenningin er galdandi í 1 ár, frá tí degi hon er givin. Arbeiðsgevarin kann tó søkja um at framleingja góðkenningina.

Um framleingjan ikki verður søkt rættstundis, t.e. áðrenn góðkenningin gongur út, kann tað hava avleiðingar við sær. T.d. kann ein umsókn frá einum starvsfólki um framleingjan av uppihaldsloyvinum ikki viðgerast í hesum tíðarskeiðnum, og starvsfólkið missir harvið rættin til at arbeiða, meðan bíðað verður eftir einum nýggjum arbeiðsloyvi.

**Hvør kann fáa góðkenning til Fast Track?**
Fyri at tú sum arbeiðsgevari kann fáa góðkenning, skalt tú vera

- skrásettur í Føroyum,
- fevndur av einum galdandi kollektivum sáttmála um lønar- og setanartreytir (t.d. vera limur í einum arbeiðsgevarafelag), og
- skrásettur hjá TAKS sum ávísingarskyldugur eftir føroysku skattalóggávuni.

Afturat hesum skal arbeiðsgevarin nýta setanarprógv, ið lúka treytirnar í løgtingslóg um setanarprógv, nýta lønarseðlar, rinda løn umvegis føroysku skattaskipanina á føroyska lønarkonto og kunna starvsfólk síni um rættindi sambært galdandi sáttmála.

Harafturat kanst tú sum arbeiðsgevari ikki fáa góðkenning, um tú ert revsaður fyri brot á útlendingalógina, um tú ert fevndur av eini lógligari arbeiðsósemju, ella um tú hevur útistandandi mál av týdningi hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ella hjá Sjóvinnustýrinum.

**Hvat kanst tú brúka góðkenningina til?**
Við eini góðkenning kanst tú seta triðjalandsborgarar í fulltíðarstarv (vanliga 40 tímar um vikuna). Arbeiðið skal vera innan karmarnar av sáttmála, sum tú ert fevndur av.

Lønar- og setanartreytir skulu vera vanligar eftir føroyskum viðurskiftum. Hetta merkir m.a., at lønin ikki má vera minni enn minstalønin fyri tilsvarandi arbeiði eftir sáttmálanum millum viðkomandi føroyskt arbeiðstakarafelag og arbeiðsgevarafelag.

**Mannagongd**

1. Fyll út og skriva undir hetta umsóknarblað. Fylg vegleiðingunum
2. Legg neyðugu skjølini við
3. Send umsóknarblaðið til Útlendingastovuna, Skálatrøð 20, postrúm 264, FO-110 Tórshavn ella á info@utlendingastovan.fo

**Hvørji skjøl skulu leggjast við umsóknini?**
Tú verður biðin um at leggja hesi skjøl við umsóknini:

- Prógv fyri, at tú sum arbeiðsgevari ert fevndur av einum føroyskum sáttmála (avrit av skjalprógvi fyri limaskap í arbeiðsgevarafelagi ella avrit av galdandi avtalu um, at tú ert fevndur av sáttmála)
- Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya
- Skrásetingarprógv úr Vinnuskránni hjá TAKS
- Váttan frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ella frá Sjóvinnustýrinum, um arbeiðsstaðið er á sjónum

Við framleingjan verður tú harumframt biðin um at leggja hesi skjøl við umsóknini:

- P-tal, setanarbræv og lønarseðlar fyri tríggjar teir seinastu mánaðirnar hjá fimm starvsfólkum við uppihaldsloyvi eftir Fast Track-skipanini. Hevur tú færri fólk í starvi eftir hesi skipan, skalt tú bert leggja skjøl hjá hesum við umsóknini

**Nær kann arbeiðstakarin byrja at arbeiða?**
Áðrenn arbeiðstakarin kann byrja at arbeiða, skulu hesar treytir vera loknar:

- Tú skalt sum arbeiðsgevari hava fingið tína góðkenning til Fast Track
- Arbeiðstakarin skal hava søkt og fingið játtað arbeiðs- og uppihaldsloyvi

Arbeiðstakarin søkir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi við at brúka umsóknarblaðið AR5.

Um arbeiðstakarin byrjar at arbeiða, áðrenn arbeiðsloyvi hansara er komið, er talan um ólógligt arbeiði, sum bæði arbeiðstakarin og arbeiðsgevarin kunnu revsast fyri við sekt ella fongsli.

**Eftirlit**
Eftirlit við skipanini verða framd bæði við framleingjan, við eftirlitsvitjan og við árligum stakroyndum. Koma upplýsingar myndugleikunum í hendi um, at treytirnar til góðkenning eftir Fast Track-skipanini ikki verða virdar, kann hetta føra til, at ein góðkenning til Fast Track verður tikin aftur ella ikki kann framleingjast, umframt at góðkenning ikki kann latast í 1 ár.

**Um tú vilt vita meira**
Tú kanst lesa meira um reglurnar fyri arbeiðs- og uppihaldsloyvi til triðjalandsborgarar á nyidanmark.dk og á utlendingastovan.fo. Um tú hevur spurningar ella tørv á vegleiðing, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Útlendingastovuna. Tú finnur okkara samskiftisupplýsingar niðast á hesi síðu.

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## 1. Upplýsingar um arbeiðsgevara (fyritøkan)

**VERÐUR FYLT ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM**

| Arbeiðsgevari/navn á fyritøku | V-tal | Skrásetingarnummar |
|---|---|---|
| | | |

| Gøta og gøtunummar | Postrúm |
|---|---|
| | |

Postnr. og bygd/býur

Kontaktpersónur

| Telefonnummar | Teldupostur |
|---|---|
| | |

## 2. Endamál við umsóknini

☐ Søkt verður fyrstu ferð
☐ Søkt verður um framleingjan

## 3. Vinnugrein

Hvør er vinnugreinin hjá arbeiðsgevara/fyritøkuni?

☐ Bilasøla, service og tangastøðir
☐ Byggivinna
☐ Orku- og vatnveiting
☐ Smá- og heilsøla
☐ Peningastovnar, fíggingar- og tryggingarvirksemi
☐ Felagsskapir, skemtanir, mentan o.a.
☐ Gistingar- og matstovuvinna
☐ Matvøru- og njótingarevnaídnaður
☐ Ídnaður (Jarn og metalvirki)
☐ Ídnaður (Evnavøru- og plastídnaður)
☐ Ídnaður (Stein-, leir- og glasídnaður)
☐ Fiskiveiða og fiskaaling
☐ Landbúnaður, veiði og skógbrúk
☐ Handil og umvælingarvirksemi (smásøla við innbúgvi)
☐ Almenn fyrisiting o.a.
☐ Kunning og samskifti
☐ Ráevnisvinna
☐ Heilsuverk og sosialar fyriskipanir
☐ Flutnings- og goymsluvinna
☐ Fastognaumsiting og húsarúm, leasing og útleiga
☐ Undirvísing
☐ Annað. Nágreina hvør vinnugreinin er:

_______________________________________________

## 4. Upplýsingar um arbeiðsgevarafelag og kollektivan sáttmála

Er arbeiðsgevarin limur í arbeiðsgevarafelagi? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, upplýs hvat arbeiðsgevarafelag.

_______________________________________________________________________________

Upplýs hvørjum kollektivum sáttmála starvsfólkini skulu setast í starv eftir.

## 5. Váttan undir trúnaðartreyt

☐ Eg vátti undir trúnaðartreyt, at eg ikki eri revsaður fyri brot á útlendingalógina.

☐ Eg eri revsaður fyri brot á útlendingalógina. *Um krossur verður settur her, setur Útlendingastovan seg í samband við løgregluna og metir um, hvørt eitt møguligt brot forðar fyri góðkenning til Fast Track.*

Viðmerking:

## 6. Váttanir

**A. Váttan um, at upplýsingarnar, sum eg havi givið, eru rættar**
Eg vátti, at upplýsingarnar, eg havi givið í hesum skjali, eru rættar.

Um tað vísir seg, at upplýsingarnar ikki eru rættar, kann tað hava hesar avleiðingar:

- Eg kann verða revsaður við sekt ella fongsli upp til 4 mánaðir (§ 162 í Revsilógini, jf. lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 22. apríl 2021)
- Eg kann blíva dømdur til at endurrinda tær útreiðslur, sum donsku og føroysku myndugleikarnir hava havt orsakað av følsku upplýsingunum (§ 40 í anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, sum seinast broytt við anordning nr. 67 frá 28. januar 2020).

**Á. Váttan um samtykki til, at myndugleikarnir útvega neyðugu upplýsingarnar**
Eg gevi samtykki til, at donsku og føroysku myndugleikarnir kunnu innheinta og geva víðari upplýsingar um viðurskifti míni, um tørvur er á hesum til viðgerð av umsóknini (§§ 28-29 í anordning nr. 1144 af 22. december 1993 om ikrafttræden af forvaltningsloven på Færøerne, sum seinast broytt við anordning 1837 frá 8. desember 2020 og §§ 27-28 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg). Upplýsingarnar kunnu gevast víðari og innheintast frá øðrum føroyskum ella útlendskum myndugleikum, her ímillum løgregluni.

Hetta er t.d. galdandi fyri upplýsingar um:

- Sáttmálaviðurskifti
- Limaskap í arbeiðsgevarafelagi
- Revsing fyri brot á útlendingalógina
- Skjølini, sum eg havi lagt við umsóknini, her ímillum upplýsingar um rættleikan av skjølunum

**B. Váttan um setanarprógv**
Váttað verður, at arbeiðstakari, ið verður settur eftir hesi skipan, fær setanarprógv, ið lýkur treytirnar í lóg um setanarprógv (Løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum). Viðmælt verður at nýta standardiserað setanarprógv.

**D. Váttan um útgjald av løn**
Eg vátti, at løn arbeiðstakarans verður goldin gjøgnum føroysku skattaskipanina á føroyska lønarkonto, og at hon samsvarar við løn sambært galdandi sáttmála í peningi, og at partur av lønini ikki kann verða latin sum vøra (naturalier) ella annað, sum er at rokna sum starvsfólkaágóðar. Virðið av møguligum starvsfólkaágóðum má leggjast afturat vanligu lønini sambært galdandi sáttmála.

**Ð. Váttan um lønarseðlar**
Eg vátti, at starvsfólk, sum verða sett eftir hesi skipan, regluliga fáa flýggjað út lønarseðlar við upplýsingum um eitt nú tímatal, yvirtíð, frítíðarløn og eftirløn.

**E. Váttan um, at starvsfólk verða kunnað um rættindini teirra**
Váttað verður, at eg sum arbeiðsgevari við starvsbyrjan ella skjótast gjørligt hereftir, kunni starvsfólk míni um rættindi teirra sambært galdandi sáttmála á økinum.

**F. Váttan um samtykki til, at navn og búmerki hjá fyritøkuni verða lýst á heimasíðu**
Eg gevi samtykki til, at navn og búmerki hjá fyritøkuni verða lýst á heimasíðu okkara (utlendingastovan.fo) á einum yvirliti yvir Fast Track-góðkendar fyritøkur.

**G. Kunning um, at arbeiðsgevarin kann revsast, um arbeiðstakarin arbeiðir ólógliga**
Um ein útlendskur arbeiðstakari arbeiðir ólógliga í Føroyum, t.v.s. uttan neyðugt loyvi ella í stríð við treytirnar í loyvinum, kanst tú sum arbeiðsgevari revsast við sekt ella fongsil upp í 1 ár (§ 59 í anordning nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, sum seinast broytt við anordning nr. 67 frá 28. januar 2020).

**H. Kunning um, at myndugleikarnir hava skrásett upplýsingar um teg og viðurskifti tíni**
Tær upplýsingar, sum tú gevur ella hevur givið í samband við umsókn tína, verða skrásettar hjá útlendingamyndugleikunum.

Tú hevur rætt til at fáa innlit í upplýsingar, sum verða skrásettar um teg (§ 9 í Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).

**I. Kunning um, at rættleikin av upplýsingum tínum kann blíva eftirkannaður**
Útlendingastovan og Styrelsen for International Rekruttering og Integration eftirkanna, um upplýsingar, sum tú gevur ella hevur givið í samband við umsóknina, eru rættar. Eftirlitið kann fara fram undir viðgerðini av umsókn tíni og seinni, tá tú møguliga hevur fingið góðkenning til Fast Track.

Eftirlitið kann fara fram við áheitan til aðrar myndugleikar. Í samband við eftirlitið kanst tú verða biðin um at senda fleiri upplýsingar.

FT

ÚTLENDINGASTOVAN

IMMIGRATION OFFICE

## 7. Undirskrift – arbeiðsgevari

**Við undirskrift míni vátti eg at hava lisið, skilt og góðtikið innihaldið í pkt. 5 og pkt. 6A-F og at hava lisið og skilt pkt. 6G-I.**

| Dagfesting og stað | Undirskrift |
| --- | --- |
| | |

## Hevur tú minst til alt?

Um umsóknin um góðkenning til Fast Track er rætt útfylt, og øll neyðug skjøl eru viðløgd, ber til hjá Útlendingastovuni at viðgera umsóknina upp á stutta tíð.

Tí er umráðandi, at tú – áðrenn umsóknin verður latin inn – kannar, um umsóknarblaðið er rætt útfylt, og um neyðugu skjølini eru viðløgd.

Vit viðmæla, at tú brúkar minnislistan niðanfyri, áðrenn umsóknin um góðkenning verður latin inn.

## Minnislisti

**Áðrenn umsóknin verður latin inn, er umráðandi, at neyðugu skjølini eru hjáløgd (tú ert vælkomin at seta kross við):**

- ☐ Dagført avrit av limaskapi í arbeiðsgevarafelagi ella avrit av galdandi avtalu um, at tú ert fevndur av sáttmála
- ☐ Dagførd váttan frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum
- ☐ Dagførd váttan frá Sjóvinnustýrinum, um arbeiðsstaðið er á sjónum
- ☐ Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya
- ☐ Dagført skrásetingarprógv úr Vinnuskránni hjá TAKS

**Framleingjan**
Um søkt verður um framleingjan av góðkenningini, skalt tú harumframt leggja skjøl viðvíkjandi fimm starvsfólkum við uppihaldsloyvi eftir Fast Track-skipanini við umsóknini. Hevur tú færri enn fimm fólk í starvi eftir hesi skipan, skalt tú bert leggja skjøl hjá hesum starvsfólkum við umsóknini.

- ☐ Upplýsing um p-tal (á setanarbrævi, lønarseðli ella øðrum skjali)
- ☐ Setanarbræv
- ☐ Lønarseðlar fyri tríggjar teir seinastu mánaðirnar

**GG!** Um upplýsingar um limaskap í fakfelagi eru á setanarbrøvum ella á lønarseðlum, skulu hesar upplýsingar fjalast, áðrenn skjølini verða latin Útlendingastovuni.

**Eisini er umráðandi, at tú hevur**

- ☐ svarað øllum spurningum og
- ☐ skrivað undir og dagfest umsóknina í pkt. 7.